FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 5. november 2021
J. nr.: 21/22252
Viðgjørt: AE

Svar til fyrispurning nr. 52-070/2021 frá Brandi Sandoy, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Jørgeni Niclasen, um vegin í Sandarlíð.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Um so er, at Løgtingið játtar peningin, nær fer so arbeiðið í gongd at bøta um vegin í Sandslíð?
2. Er ætlanin at gera allan teinin gjøgnum Sandslíð tvísporaðan?
3. Er ætlanin, at Landsverk skal standa fyri arbeiðinum, ella er ætlanin at bjóða arbeiðið út til privatar at gera?
4. Hvat er gjørt fyri tær 2 mió. kr., sum vegurin í Sandslíð fekk játtaðar á fíggjarlógini fyri 2021?
5. Hvør verður arbeiðsgongdin, tá arbeiðið eftir ætlan fer í gongd, og hvussu er ætlanin at leiða ferðsluna eftir hesum vegi, meðan arbeitt verður?
6. Nær er ætlanin, at arbeiðið við vegnum skal verða liðugt?

Svar til spurning 1, 2, 3, 4 og 6
Vegurin gjøgnum Sandslíð er bygdur í 1920-21, og er sostatt 100 ár, og ein av elstu vegum í landinum. Vegurin er ein 1.500 metrar langur einbreytaður vegur, ið liggur í brattlendi. Vegurin er til eysturbygdirnar á Sandoynni, har umleið 250 fólk búgva. Dagliga koyra millum 400 og 500 akfør á vegnum.

Játtanin í ár hevur verið brúkt til at gera neyðugar ábøtur á vegin, og til at fyrireika verkætlanina.

Í løtuni verður eitt prosjekt fyrireikað, har allur vegurin verður breiðkaður til ein tvíbreytaðan veg. Borað og sprongt verður eftir ætlan í lendinum omanfyri verandi veg, og verður vegurin í høvusheitum breiðkaður inn eftir móti fjallinum. Øki kring vegin verður eisini dagført og tryggjað. Til dømis verður ein grøv gjørd í ovara borði at taka ímóti møguligum gróti sum ríður oman.

Nakað av myndugleikaviðgerð er eftir, eitt nú við friðingarmyndugleikar. Harumframt er lendiskeyp. Miðað verður eftir at bjóða verkætlanina út, soleiðis at arbeiðið at byggja vegin kann byrja á sumri í 2022. Verkætlanin verður bjóðað út til privatar at gera.

Sambært Landsverki, kann arbeiðið verða liðugt í 2023- 2024. Hetta er sjálvandi treytað av játtan, og at arbeiðið kann fremjast uttan størri trupulleikar.

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Svar til spurning 5
Eftir ætlan skal ferðslan hava møguleika fyri at koyra meðan arbeiðið fer fram. Arbeiðstakarin skipar ferðsluna í hesum sambandi.

Vegurin kann verða stongdur eftir avtalu við Landsverk, tá ið tað til dømis verður sprongt. Hetta kann verða skipað, sum ein føst daglig steinging, so fólk vita nær vegurin kann væntast at vera stongdur.

Tinganes, 5. novembur 2021

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum